# Setrið á skíggjan

**Í hesum døgum verða fyrilestrar tiknir upp á Fróðskaparsetrinum. Ætlanin er, at Sjónvarpið skal senda hesar fyrilestrar, sum verða hildnir av føroyskum vísindafólki**

VÍSINDI

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*




*Høgni Hammershaimb Debes býtir sína vitan við onnur, meðan upptøkutólini syrgja fyri, at eftirtíðin eisini fær gagn av frálæruni*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Í sambandi við at Fróðskaparsetur Føroya fylti 40 ár í 2005, skipaði stovnurin saman við Føroya Fróðskaparfelag fyri fyrilestrarøðini “Setrið á ferð”.

Tiltakið varð skipað í samstarvi við kunningarstovurnar í Suðuroy, á Sandi, í Vágum, í Fuglafirði og mentanardeildini hjá Klaksvíkar Býráði, og nú er ætlanin, at upp aftur fleiri fólk skulu fáa atgongd til ta vitan, sum varð borin fram á hesum fyrilestraferðum.

Á heimasíðuni hjá Fróðskaparsetrinum verður upplýst, at nú er tíðin komin til at fyrilestrarnir verða tiknir á band fyri síðani at verða sjónvarpaðir.

Upptøkurnar fara fram í høllini á Vinnuháskúlanum í hesum døgum, og evnini fevna um alt frá toski til kvinnur og kvæði.

Annika Sølvará, setursskrivari, sigur, at hetta er ein avleiðing av fyrilestrarøðini “Setrið á ferð”, ið fór fram í 2005 og 2006, sum hon heldur eydnaðist sera væl.

- Endamálið hjá okkum er at miðla, sigur Annika Sølvará, og vísir á endamálsorðingina hjá Fróðskaparsetrinum, har tað m.a. stendur, at tey skulu “breiða út kunnleika um vísindalig úrslit og háttaløg”.

### Almennan áhuga

Fleiri kenna kanska ta donsku sjónvarpsrásina DK4, sum sendir fyrilestrar við frøðingum av ymiskum slagi. Annika Sølvará metir tó, at góðskan á fyrilestrunum hjá Setrinum verða av betri sendigóðsku. M.a. av tí at fleiri upptøkutól verða nýtt. Harafturat eru fólk boðin at koma til fyrilestarnar, so áhoyrarar verða til staðar.

Talan er sum nevnt um eitt breitt úrval av evnum. Dentur er tó lagdur á, at fyrilestrarnir skulu hava almennan áhuga. Annika Sølvará metir tó, at fólk kanska framman undan vita meira um grindabýti, ið tey flestu hava verið við til, enn t.d. unhvørviseitur, ið kanska er meira tekniskt. Men endamálið er sum sagt at miðla vitan víðari til almenningin.

Enn er ikki greitt, nær hesir fyrilestrarnir verða vístir í Kringvarpi Føroya. Ivan Niclasen, programmleiðari í Sjónvarpinum, sigur, at enn er einki endaligt heiti funnið fyri hesar sendingar, men at talan í fyrstu syftu helst verður um einar 20 fyrilestrar.

**Sambært heimasíðuni hjá Fróðskaparsetrinum verða hesir fyrilestrar tiknir upp í hesum døgum og verða væntandi sendir í Sjónvarpinum**

| | |
|---|---|
| Pál Weihe | Umhvørviseitur ávirkar heilsuna hjá Føroyskum børnum |
| Jan Sørensen (biofar) | Korallir í føroyskum havøki |
| Malan Marnersdóttir | Kvinnur og kvæði |
| Sólfinn Hansen | Søga í tvístøðu |
| Jóan Pauli Joensen | Grind og grindabýti |
| Símun Arge | Fornt svínahald í Føroyum |
| Høgni Hammershaimb Debes | Havsins gras |
| Elif Gaard | Gróður og fiskur |
| Bogi Hansen | Hav og gróður |
| Eyðfinn Magnussen | Toskurin á Føroya banka |
| Magni Laksafoss | Føroyski búskapurin |
| Sámal Tróndur F. Johansen | Føroyar í kalda krígnum |
| Petur Zachariassen | Frá atkvøðum til tingsessir |
| Erland Viberg Joensen | S.E. Müller |
| Durita Nielsen | Góðska á alifiski |
| Dorete Bloch | Føroyska haran |
| Anna Maria Fosaa | Plantuvøkstur í einum umhvørvi sum er í broyting |
| Jógvan í Lon Jacobsen | Stendur purisman fyri falli |
| Martin Heinesen, Simon Passey og Turid Madsen | Føroya jarðfrøði – við serligum atliti at tunlum |
| Turið Sigurðardóttir | Føroysk sum lærugrein og granskingarevni |
| Firouz Gaini | Risikosamfelagið hjá Ulrich Beck |

## Stýrið fyri Kringvarpið ikki saman enn

**Fyrsti fundurin hjá nýggja stýrinum fyri Kringvarpið er útsettur til 23. januar**

FJØLMIÐLAR

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Herfyri varð nýtt stýri sett fyri Kringvarpið. Hóast fleiri politikarar søgdu seg fegnast um, at nú blivu skottini millum politisku vøldini og Kringvarpið enn meira tett, enn tey vóru frammanundan, varð ivi skjótt sáddur um gegnið hjá fleiri av stýrislimunum.

Ætlanin var, at fyrsti fundurin hjá stýrinum skuldi vera í dag, men hann er útsettur til týsdagin 23. januar.

Jóannes Dalsgaard, deildarstjóri í Mentamálaráðnum, sigur við Sosialin, at orsøkin til, at fundurin er útsettur, er, at at fólk skulu á annan fund og til jarðarferð, og tí hevur hetta einki við spurningarnar um gegni at gera.

- Vit meta fólkini sum gegnig, sigur Jóannes Dalsgaard.

Jógvan Elias Winther Poulsen, advokatur, er settur at gera eina kanning av gegninum hjá stýrislimunum.

# Alfred Olsen ikki at hitta

**Í seinastu viku frættist, at Alfred Olsen atkvøður við samgonguni, hóast hann hevurt tikið seg úr henni. Fleiri hava funnist at støðu hansara, men sjálvur frættist einki frá Alfred Olsen um støðu hansara í føroyskum politikki, har hann enn er formaður í Rættarnevndini, hóast hann ikki er í samgonguni. Alfred Olsen tekur snøgt sagt ikki telefonina**



*Alfred Olsen er kúrrur um støðu sína sum tinglimur uttan fyri samgonguna, ið stuðlar somu samgongu*

POLITIKKUR

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið hevði Sosialurin samrøðu við Kaj Leo Johannesen, formann í Sambandsflokkinum, har hann m.a. greiddi frá, at hann hevði fingið vissu fyri, at Alfred Olsen, næstformaður í flokkinum, atkvøddi við samgonguni, hóast hann hevði tikið seg úr henni.

Kaj Leo Johannesen viðgekk tó, at talan var um eina undarliga støðu.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður og samgonguleiðari, segði m.a. at í politisku skipanini kann eingin sæta sær sjálvum, og at ætlanin var at hava fund innan tingfundin 23. januar.

Bjørn á Heygum, advokatur og fyrrverandi sambandstingmaður, kallaði støðuna hjá Alfred Olsen eina andsøgn.

### Eingin samgongufundur um Alfred

Sosialurin hevur roynt at fingið orðið á Alfred Olsen um støðuna, nú hann eftir øllum at døma stendur uttan fyri samgonguna, men hann hevur ikki svarað, tá vit hava ringt. Vit høvdu ætlað at spurt Alfred Olsen, um hann heldur fram sum formaður í Løgtingsins rættarnevnd, og givið honum møguleika at gjørt viðmerkingar til útsagnirnar hjá m.ø. Jóannes Eidesgaard og Bjørn á Heygum. Men hetta hevur sum nevnt ikki eydnast.

Spurdur, hvat formaður Sambandsfloksins heldur um, at fjølmiðlar ikki fáa orðið á næstformannin í flokkinum, sigur Kaj Leo Johannesen:

- Tað havi eg onga viðmerking til.

Kaj Leo Johannesen, sigur, at eingin fundur hevur verið í samgonguni um formannin í Rættarnevndini, Alfred Olsen.

- Tað er einki hent enn. Eg havi einki frætt enn, sigur Kaj Leo Johannesen, tá hann verður spurdur, um hann hevur fingið fundarboð frá løgmanni.